# Eingin burturspilt tíð

**Nú starvsvenjingartíðin hjá 10. flokkunum í Kommunuskúlanum í Havn er av, hava vit verið og prátað við nakrar næmingar um, hvussu teirra starvsvenjingartíð royndist**

STARVSVENJING
*Anja Brekkstein & Sólrun Hansen, praktikkantar*



*Turið M. Jóhansdóttirsitur situr her saman við Anni og arbeiðir*

Í framhaldsdeildini hava allir fólkaskúlanæmingar fyri fyrstu ferð møguleikan at fara í starvsvenjing. Hetta verður skipað á skúlanum saman við næmingunum. Fyrireikingar verða gjørdar áðrenn, so næmingarnir fáa ein kunnleika um, hvat tað er at vera í starvsvenjing. Starvsvenjingartíðin hjá øllum varða í tvær vikur, og fáa næmingarnir hesar vikurnar høvi at royna nakað nýtt, sum kanska seinni í framtíðini fer at hjálpa teimum at velja eina útbúgving.

Men er tað yvirhøvur nøkur meining við at fara í starvsvenjing? Turið M. Jóhansdóttir var í starvsvenjing á Verkstaðnum Vónini á Argjum. Hetta hevur henni dámt sera væl.

- At arbeiða við menningartarnaðum stendur nú hægri á listanum enn áður, og tí haldi eg, at tað hevur havt stóran týdning fyri meg, at verið í starvsvenjing, sigur Turið.

Dagurin hjá Turið byrjaði klokkan 08 hvønn morgun. Í verkstaðnum eru tað ymiskar deildir, s.s. evnisdeild og seymideild. Her hevur Turið arbeitt saman við teimum menningartarnaðu, og hjálpt teimum at gjørt jólapynt, mála, klipt, seymað og annað. Eisini hevur hon verið á Hunsarabotni og aðrastaðni, greiðir Turið okkum frá.

Klokkan tvey í gjár endaði so arbeiðsdagurin og starvsvenjingartíðin hjá Turið. - Tað hevur verið ógvuliga spenandi og lærurikt, og eg havi havt tað frálíka gott. Starvsvenjingartíðin fer óivað at hava stóra ávirkan á meg, tá eg seinni skal velja mær eina útbúgving, og tí haldi eg, at tað er sera umráðandi, at næmingar sleppa í starvsvenjing, og eg haldi ikki, at hetta er ein burturspilt tíð frá skúlanum. Eg vil heilt sikkurt ráða øðrum til at fara í starvsvenjing á Vónini, sigur Turið at enda við okkum.

### Einsamøll høna millum hanarnar

Eftir at vit høvdu prátað við Turið, gekk leiðin framvið SMS. Har prátaðu vit við Rannvá H. Augustinusen, ið heuvr verið í starvsvenjing hjá Skálki. Teimum flestu kunnugt, so hava tað verið drúgvar umvælingar í SMS, og hevur Skálkur tí verið á Torginum í nakrar vikur.



*Rannvá H. Augustinusen aftanfyri kassan í Skálki.*

Fyrstu vikuna arbeiddi Rannvá á Torginum, har hon legði klæðir saman og stóð við kassan. Seinnapart leygardagin og sunnudagin hjálpti hon at pakka klæðir út og gera nýggju hølini hjá Skálki í nýggju lonini í SMS kláran til mikudagin, tá allir handlarnir aftur skuldu opna.

-Tað hevur verið eitt stórt upplivilsi at verið í starvsvenjing, og nú veit eg fyri vissu, at eg seinni ætli at læra til krambakvinnu, sigur Rannvá. Hon heitir tí á næmingar, ið ætla sær at verða krambafólk at fara í starvsvenjing hjá Skálki.

Í Skálki arbeiða bara mannfólk í løtuni, so Rannvá hevur verið einsamøll høna millum allar hanarnar. Vit spurdu Rannvá, um tað hevði nakra ávirkan á hana.

- Eg havi havt tað sera stuttligt og havi trívst væl sum einsamøll høna, sigur Rannvá at enda við einum smíli.

Vit báðar, Sólrun og Anja, vilja gjarna nýta høvi at takka Sosialinum fyri okkara starvsvenjingartíð. Hetta hava verið tvær ógvuliga spennandi og lærurikar vikur.

# Biddaradrongurin Mark

**Á gongubreytini framvið við Union Street í Aberdeen situr hópur av biddarum, flestu teirra eru ungir dreingir. Sofus Poulsen, sum í mong ár hevur verið føroyskur sendifulltrúi í Aberdeen, sigur, at hetta er lutfalsliga nýtt fyribrigdi í har.**

ABERDEEN
*Rúna Sivertsen*

Millum allar teir mongu biddaradreingirnar, ið sita á gongubreytini framvið Union Street í Aberdeen, skilir Mark seg burturúr.

Mark sær ikki so illa út sum hinir og hevur eina snøgga nýmótans frisuru.

Vit kundu ikki bara okkum, men vendu aftur fyri at spyrja Mark, hví hann sat har.

"I'm begging"; svaraði hann smílandi óneyðuga spurningi okkara.

Vit søgdu honum, at orsøkin til at vit vendu aftur at tosa við hann var, at vit mistonktu hann fyri ikki at vera rættan biddara, men bert ein, sum vildi vinna sær eyka pening.

*- Hvussu hevur tú ráð til eina so vakra frisuru, spurdu vit.*

Mark flenti og streyk hendurnar gjøgnum hárið glaður um, at okkum dámdu frisuruna.

- Onkuntíð sleppi eg at sita modell, tað skal eg einki gjalda fyri, segði Mark.

### Heimleysur

Spurdur, hví hann ikki fór í skúla, so hann kundi fáa eitt vanligt arbeiði, segði Mark, at tað fór hann so skjótt, hann fekk nakað at búgva í.

- Í løtuni búgvi eg í einum bilhúsi saman við fýra øðrum dreingjum. Frá sosialu skipanini fái eg 20 pund um vikuna - og nakað hiðani er eitt hús, har vit kunnu vaska okkum og fáa ein kaffimunn.

Mark er úr Glasgow og fyri 10 árum síðani rýmdi hann frá foreldrum sínum, bert 16 ára gamal. Mark segði, at hjá sær var einki at fara heimaftur til.

Spurdur, um hann nakrantíð hevði leitað sær hjálp í nakrari kirkju, segði Mark:

Eg gekk í eina kirkju fyri nøkrum árum síðani, men tað var ikki nakað fyri meg.

Eftir eitt stutt prát, søgdu vit hesum unga og fryntliga manni farvæl, og sleptu nøkrum blankum myntum í húgvuna, sum lá á gongubreytini.

"God bless you!", heilsaði Mark okkum, tá vit spakuliga fóru víðari niðan eftir Union Street í Aberdeen.



*- Á gongubreytini á Union Street í Aberdeen, situr 26 ára gamli Mark og biddar. Mark er heimleysur og um veturin skiftir hann tunna bummullsstykkið út við heitari teppi, sum góð fólk hava givið honum. Biddaradreingir eru alt vanligari at síggja á gøtunum í Aberdeen.*

*Mynd: Rúna Sivertsen*



# Landsstýrismaðurin loypur frá

**Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, er als ikki nøgdur við fíggjarlógaruppskotið, sum lagt er fram. Hann sigur, at landsstýrismaðurin við vinnumálum loypir frá gjørdum avtalum**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Hergeir Nielsen, løgtingsmaður er als ikki glaður fyri fíggjarlógaruppskotið, sum komið er. Hann vil ikki góðtaka, at bæði Vágs Havn og sambandið millum Øravík og Hov eru strikað av íløgujáttanini.

Hergeir Nielsen hevði væntað pening til bæði vegagerð millum Øravík og Hov, eins og pening til útbygging av Vágs Havn. Sum skilst á Hergeri Nielsen, ætlar hann ikki, at hetta uppskotið skal verða tann endaliga fíggjarlógin, sum samtykt verður.

Hergeir Nielsen sigur við Sosialin, at landsstýrismaðurin við vinnumálum loypir frá gjørdum avtalum í fíggjarlógaruppskotinum.

Hann vísir á, at landsstýrismaðurin við vinnumálum hevur roynt at selt suðringum ein tunnil millum Øravík og Hov fyri 100 milionir krónur, sum skuldi koma í staðin fyri útbygging av Vágs Havn.

Men nú fígjarlógaruppskotið er komið, er einki sett av. Hvørki til tunnil ella havnagerð. Og tað fer Hergeir Nielsen ikki at lata sær lynda, sigur hann.

– Landsstyrismaðurin við fíggjarmálum hevur sett seg upp móti løgtingsins vilja, og tað fer at svíða sum vøllir, sigur Hergeir Nielsen, løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin í Suðuroy.



*Hergeri Nielsen fer als ikki at góðtaka verandi uppskot til fíggjarlóg. Hann krevur pening til íløgur í samferðslukervið í Suðuroy*

# Havnarlagið flutt upp á land

**Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sigur, at peningurin, sum hann ætlaði til Vágs Havn, varð av Fíggjarmálaráðnum fluttur til skúlabygging í Vági**

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, váttar, at hann hevur lovað pening til samferðsluna í Suðuroy. Men eftir at hann hevði latið sítt uppskot frá sær, raðfesti Fíggjarmálastýrið av nýggjum soleiðis, at peningur varð játtaður til skúlabygging í Vági. Tann peningurin varð tikin av §6, sum eru vinnumál. Soleiðis varð havnarlagið í Vági óbeinleiðis flutt upp á land har suðuri, sigur landsstýrismaðurin við vinnumálum.

Bjarni Djurholm sigur eisini, at hann hevur skotið upp at spara umleið 30 milliónir krónur av viðlíkahaldi, sum umvegis ávís lógaruppskot, hann í løtuni arbeiðir við, so kunnu flytast aðrastaðni. Eitt nú til tunnilsgerð í Suðruoy. Hetta er viðgjørt í samgonguni. Eisini við Tjóðveldisflokkin, sum tekur undir við tí. Og tí veit Hergeir Nielsen væl av, sigur Bjarni Djurholm.

Hann vísir eisini á, at samlaða íløgujáttanin til Vinnumáláráðið var upp á 145 milliónir. Av hesum fara 132 til Smyril og Drelnes, so tað er greitt, at trongligt verður aðrastaðni. Eisini á Hovsvegnum, sigur hann.

# Peningurin kann flytast

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Jógvan við Keldu, løgtingsmaður, er ikki skakkur av, at einki er sett í fíggjarlógaruppskotið til tunnil undir Leirvíksfirði. Hann hevur álit á, at avlopspeningur, sumer tøkur, kann flytast til komandi játtan

Tað standa óbrúktir pengar, sum kunnu flytast umvegis annleggslógina, soleiðis at tunnilsarbeiðið undir Leirvíksfirði kortini fær part, sigur Jógvan við Keldu, løgtingsmaður.

Hann er einki bangin fyri, at tey verða við sviðisoð har norðan fyri Leirvíksfjørð, hóast einki stendur í fíggjarlógaruppskotinum um pening til tunnilsætlanina undir Leirvíksfirði.

Jógvan við Keldu sigur, at hann fyri stuttum spurdi um málið á samgongufundi, og fekk har játtað, at tað ber til at flyta hendan peningin. Ta játtanina fer hann so at halda seg til, sigur hann.

– Høvuðssakin er nú, at partafelagið fær pening at seta arbeiðið í gongd fyri, sigur hann.

Um tað kortini skuldi hent, at eingin peningur verður fluttur, so sum hann vónar, er støðan ein heilt onnur, sigur Jógvn við Keldu, løgtingstingmaður Fólkafloksins í Norðoyggjum, uttan tó at vilja siga nágreiniliga, hvat hann so fer at gera.

# Hálv játtanin til Suðuroyar

FÍGGJARLÓG
*Edvard Joensen*

Av teimum 260 milliónunum, sum væntandi veðra brúktar til íløgur á komandi fíggjarlóg, fær samferðslan til Suðuroyar umleið helvtina. Smyril fær 107 milliónir, og samferðsluhavnin á Drelnesi er sett til 25 milliónir

Tvær havnir fáa pening til nýgerð komandi ár, og fýra vegastrekki fáa játtan. Helvtin av játtanini til vegagerð fer til Gásadalstunnilin. Samferðsluhavnirnar á Drelnesi og Syðradali á Kallsoy fáa 39 milliónir.

Íløgurnar til nýgerð av landsvegum minka við umleið 30 milliónum í mun til verandi fíggjarlóg. Tilsamans seks milliónir krónur eru settar av til nýgerð í uppskotinum, sum Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum legði fram í gjár.

Av teimum seks milliónunum er helvtin, tríggjar milliónir settar av til vega- og tunnilssambandið til Gásadals. Ein millión í part er sett til tey trý økini Skálafjørð - Strendur, Gomlurætt - Tórshavn og nýggja innkoyring til Tórshavnar.

Nýggja samferðsluhavnin á Syðradali fær eftir uppskotinum 14 milliónir, meðan 25 milliónir skulu brúkast til samferðsluhavnina á Drelnesi.

Til bygging av nýggja Smyrli eru settar 107 milliónir av, og tað er so tað, Strandferðslan kann vænta sær komandi ár.

Einki oyra er sett av á fíggjarlógaruppskotinum til tunnilstrygd, so sum trygging av loftum, ljós og annað, sum skal gerast.

Heldur einki er sett av til undirsjóvartunnil undir Leirvíksfirði, og einki er sett av til vegagerð í Suðuroy.

Vágs Havn er ikki nevnd í fíggjalógaruppskotinum fyri 2003, og eingin játtan yvirhøvur er til studning til havnir.

